




# Á vestfallið við teknmáli og jólakalendara?

Val X



HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi

Hetta er útmeldingin frá Kringvarpsnevndini, nú peningurin ikki røkkur fyri árið 2008.

Skilji væl at ein nevnd sum situr við ábyrgd, og tekur hesa ábyrgd í fullum álvara, við hesum uppskotið roynir at seta fokus á truplu støðuna hjá Kringvarpinum. Peningurin røkkur ikki til og politiska skipanin letst ikki um vón.

Nú velji eg at trúgva at harðliga útmeldingin, um at strika tilfar til júst teir veikastu bólkarnar, okkara deyvu borgarar og børnini, júst er gjørd fyri at "vekja fiskarnar" og royna at skapa eitt kjak um sjónvarp og útvarp í Føroyum í framtíðini.

Eftir mínum tykki er einasta gongda leið at seta ferð á framleiðsluna av føroyskum tilfarið til allar aldursbólkar. Kringvarp er so týðandi táttur í menningini av fólkaræðinum og eins týðandi táttur sum mentunarberi og samleikamennari, at allar árar skulu leggjast í sjógv fyri at klára at lyfta ta stóru uppgávu hetta arbeiði er.

So mín niðurstøða er greið, Kringvarpið eigur at koma á fíggjarlógina við eini munandi upphædd, so rúmd verður fyri eini veruligari menning av einum føroyskum Kringvarpið, har eisini rúmd er fyri veikastu bólkunum í samfelagnum, børnunum og teimum deyvu.

Hetta er íløga í mentan, samleika og fólkaræðið.

**X við E Heidi P**

Les meira á *www.tjodveldi.fo/heidi*

# ALS til sjómenn

Val X



GERHARD LOGNBERG
Løgtingsmaður
Javnaðarflokkurin

Eg havi síðan eg kom í landspolitikk, havt tað órættvísi frammi, sum ALS-skipanin hevur ímóti fiskimonnum/útrórðrarmonnum. Teir gjalda inn til skipanina, tað er har sum stóra órættvísi er, tú kann ikki gjalda inn á sama hátt sum onnur og tá so ástendir, fær tú einki. So kann onkur siga, hví gera tit so einki við trupulleikan.

Jú í 2003 legði eg, saman við Henrik Old, uppskot fyri tingið um at rætta henda trupulleika, har fekk hetta uppskot drúgva viðgerð, flest vóru samd og hildu at hetta var órættvíst, sum tað eisini er, men tá atkvøðast skuldi fekk málið 7 atkvøður fyri og eina var blonk.

Síðan er málið viðgjørt, men ikki er komið á mál.

Hetta meti eg órættvíst, um eitt skip verður lagt vegna umvæling í ávísa tí, so skal einasti møguleiki hjá sjómonnum fyri at fáa mat á breyðið, at verða uppsagdur á skipinum. Eftir uppsagnina og sjómaðurin er komin í ALS-skipanina, kann ALS ávísa hesum manni ein annan kjans og kann so maðurin kanska ikki náa at vera heima aftur fyri at koma umborð á skipið, sum hann so áheppin mátti blíva uppsagdur av. Tá ein er skrivliga uppsagdur, tá stendir hann veikur. Tá ein er uppsagdur á einum skipi skulu 6 mánaðir ganga áðrenn hann kann mynstra við aftur.

Taka vit útrórðarbátar, so er skili tað sama. Skal ein maður fáa ALS, ja so má hann selja bátin og standa á berðum, hetta er ikki gott ella rættari út av lagið og fari eg framhaldandi at arbeiðða fyri hesum, um eg verði valdur.

Annars má sigast at ALS-skipanin var eitt bragd, men hetta er nakað sum skal rættast

# Sama rætt og frælsi at virka, velja og virðast

Val X



HØGNI HOYDAL
Tjóðveldi

Tað var í grellari andsøgn til okkara politisku mál, at Hans Birgir ikki fekk orðið á valfundinum í Lærara-skúlahøllini leygarkvøldið

Aðalmálið í politikkinum hjá Tjóðveldinum er, at øll skulu hava sama rætt og frælsi at virka, velja og virðast – tá vit ikki gera okkum inn á rættin hjá hinum.

Hetta er galdandi í okkara altjóða politikki, har føroyingar skulu hava sama rætt og frælsi at virka, velja og virðast sum onnur fólk.

Tað er kjarnin í okkara mentanarpolitikki, har mentanarlívið sjálvsagt skal virka frælst.

Í okkara sosial- og heilsupolitikki snýr tað seg ikki um at gera nøkur til klientar, men samhaldsfast at tryggja amboðini til, at øll hava sama rætt og frælsi at virka, velja og virðast.

Í okkara útbúgvingar- og granskingarpolitikki skulu vit tryggja øllum sama rætt og frælsi.

Í vinnupolitikkinum skulu somu virkis- og kappingarmøguleikar vera.

Umhvørvispolitikkurin snýr seg um, at vit, ið nú liva, skapa sama rætt og frælsi at virka og liva til onnur í heiminum og til okkara eftirkomarar.

Og ikki minst, tá ræður um rættartrygd og grund-leggjandi frælsi mótvegis tí almenna og í tí almenna rúminum.

Tí var hendingin í Lærarskúlahøllini leygar-dagin í grellari andsøgn til hesi mál.

Hans Birgir Hansen, sum ein vanligur veljari, fekk ikki orðið. Helst tí hann verður mettur øðrvísi og ringur at stýra.

Tað er átaluvert. Havi skilt, at Hans Birgir hevur fingið eina umbering frá Kringvarpinum.

Tað mest rangvørga er, at Hans Birgir segði mær aftaná, at hann hevði ætlað at sett mær ein spurning um... ja, um rættartrygd og frælsi hjá øllum borgarum.

Hetta má ikki endurtaka seg.

# Útjaðarin grætur eftir læknum og tannlæknum

Val X



RODMUNDUR NIELSEN
Fólkaflokkurin

Skipan skal gerast soleiðis, at tað er áhugavert at koma aftur til Føroyar at virka sum lækni ella tannlækni.

Lønin eigur ikki at vera orsøkin, til at læknar velja starvsleið í útlandinum. Tað er neyðugt at gera skipanir sum veruliga draga fólk heimaftur eftir lokna útbúgving.

Spurningurin er eisini um setunnarmyndugleikin av læknum ikki skal flytast frá landsins myndugleikum og yvir til kommununar. Ella at kommununar koma meira við í hetta arbeiðði, tí tað eru kommununar, sum gera karmarnar fyri virkseminum hjá læknunum.

Kommununar eiga at hava beinleiðis ávirkan á starvsetan og at lønar karmurin eigur at kunna vaksa fyri at eggja nýggjum læknum at søkja kommunulæknastørvini sum eru leys kring landi. Kommununar merkja henda trupuleika hvønn einasta dag, og í dag tykist tað ikki sum vend kemur í skeivu gongdina.

Tá ið vit tosa um tannlæknar eiga vit at gera eina skipan har fleiri føroyingar fáa møguleikan at taka útbúgvingina. Føroyingar áttu at fingið eina ávísa kvotu árliga, á sama hátt vit hava havt á Danmarks Journalistháskúla. Tað er sera trongt á tannlæknaskúlanum og ringt at fáa nýútbúnar tannlæknar heimaftur.

**Valevni Fólkafloksins á Lista A, sjálvandi!**

# Hvussu koma vit á mál við eldraøkinum

Val X



EIVIN JACOBSEN
Sambandsflokkurin

Tey bleytu virðini standa ovarliga hjá øllum flokkum nú valstríðið av álvara er byrjað.

Eldrabústaðir, eldrarøkt skulu mennast. Fleiri ellisheim og sambýlir skulu byggjast. Starvsfólk skulu hava møguleika fyri fagligari menning, og tey eldru ellisheimini skulu umvælast eftir nútíðartørvi. Bert fyri at nevna nøkur ting, sum verða umrødd í visión 2015.

Alt hetta ljóðar gott í oyrum veljarans, og eiga vit øll, sum bjóða okkum fram, at taka undir og arbeiða út frá hesum málsetningi. Tilveran og eldraár hjá teim eldru og veiku skulu ikki verða ymisk, hvar í landinum tú býrt.

Men verðuleikin er í tveimum. Líkamikið hvat vit halda og lova, so eru kommunurnar ein týdningarmikil, og avgerðandi partur á hesum økið

Sagt verður at uppgávur skulu leggjast út á kommunur. Eitt greitt ábyrgdarbýti skal verða ímillum land og kommunu, her til eru vit samd. Ì 1999 kom kommunuálitið út, sum lýsti ein greiðan kommunustruktur, men 8 ár seinri, eru vit ikki komin nógv longri.

Hvussu langt eru vit komin at leggja uppgávur út á kommunur, burtursæð frá barnaansingini. Trupulleikin liggur í, at tann kommunali bygnaðurin liggur ógreiður, og so leingi sum ein framtíðar leistur fyri kommunala økið, ikki er komin uppá pláss, rópa vit ímóti vindinum.

Hvussu nógvan pening hava kommunurnar sett av á fíggjarætlanini fyri 2008 til umbygging, útbygging ella nýbygging á eldraøkinum? Er nøkur umsókn um nevndu viðurskiftið í heilsumálaráðnum?

Tað eru hesi viðurskiftið, sum draga út og eiga at fáast uppá pláss. Avgerð og ábyrgd mugu fylgjast at. Land og kommunur, serliga kommunur, mugu tosað sama mál í øllum uppgávum, sum verða lagdar út á kommunurnar.

Tí er tað líkamikið hvat vit, sum bjóða okkum fram, siga ella ætlað. Eru kommunalu økini ikki samd og draga somu línu, er trubult at koma víðari.